**BARNA- OG ÚTBÚGV INGARMÁLARÁÐIÐ**

# Tíðaravmarkað starv sum fyrstilærari í Nólsoyar skúla

**Barna- og útbúgvingarmálaráðið sóknast eftir einum dugnaligum leiðara, ið hevur áhuga fyri námsfrøðiligari og fakligari menning og hegni at átaka sær leiðslustarv í føroyska fólkaskúlanum**

Tíðaravmarkað starv sum fyrstilærari í Nólsoyar skúla skúlaárið 2023-24 verður lýst leyst til setanar frá 1. august 2023. Í Nólsoyar skúla eru 13 næmingar innskrivaðir í 1. - 7. flokki skúlaárið 2023-24 og 1 næmingur í forskúla. Ein lærari umframt skúlaleiðaran starvast í skúlanum.

**Um starvið**
- at standa á odda fyri fakligari og námsfrøðiligari menning
- at fremja eina mennandi starvsfólkaleiðslu og virka fyri, at starvsfólk skúlans hava umstøður fyri fakligari menning
- at virka fyri trivnaði og góðum samstarvi við atliti at næmingum og starvsfólki skúlans
- at skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri ávirkan og samábyrgd
- at fremja gott samstarv millum skúla og heim og eggja næmingum og foreldrum at fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt
- At umsita fíggjar- og rakstrarstýring skúlans

**Samstarvsskipan í Tórshavnar kommunu**
Fyrstilærarin virkar í tøttum samstarvi við mentamáladeildina og trivnaðarfyrisitingina, umframt við aðrar deildir í kommununi. Samstarv er millum skúlaleiðararnar við denti á, at skúlaleiðararnir í felag virka fyri at menna skúlaskapin í kommununi. Skúlin samstarvar við Eysturskúlan um førleikastovuna og lærugreinir í 7. flokki. Harumframt er skipað samstarv millum Nólsoyar skúla, Kaldbaks skúla og Velbastaðar skúla

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava
- Læraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum
- Leiðsluroyndir og skeið innan leiåðslu eru ein fyrimunur

**Setanarviðurskifti**
Setanarøkið er undir Barna- og útbúgvingarmálaráðnum við fyribils tænastu í Nólsoyar skúla. Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar í starvinum. Starvið er flokkað í lønarflokki 31.3 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir**
Umsókn saman við avriti av læraraprógvi, C.V. og viðmælum skal verða Barna- og útbúgvingarmálaráðnum í hendi í seinasta **lagi 4. juli 2023**.

**Umsóknin verður stílað til**:
Barna- og útbúgvingarmálaráðið
Tinghúsvegur 5-7
Postrúm 3279 110 Tórshavn
ella við t-posti: bumr@bumr.fo

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu ringja til Høgna V. Warberg, fulltrúa, tlf. 555054.

***Barna- og útbúgvingarmálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, gransking barnavernd, barnaheilsu og dagstovnaøkið. Sí heimasíðu ráðsins [www.bumr.fo](http://www.bumr.fo)*